# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
POST@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*- Hava okkara politikarar akt, sum teir hava makt, hava teir at gera so væl at taka viðurskiftini hjá okkara gomlu í álvara og gera nakað við tað. Alt annað er tómt tos og faktir, sum eingin kann taka fyri fult, og er bert at sammeta við tómt túnatos 4. hvørt ár, tá valstríð er.*
DAGNY JOENSEN

## Meira samband!

Tað man tykast mongum eitt sindur løgið, tá ið tey hoyra, at Útnorðursráðið mælir til, at okkara børn skulu læra grønlendskt og íslendskt í fólkaskúlanum. Er tímatalvan ikki nóg trong frammanundan? Er hetta ikki í so søkt? Er hetta ikki eitt sindur av eini provokatión? Nei, soleiðis eiga vit ikki at hugsa. Vit eiga júst at hugsa sum virkandi formaður ráðsins: hetta snýr seg um okkara felags samleika og okkara støðu sum útnorðurstjóðir í einum altjóðagjørdum heimi.

Tískil skal áheitanin um at okkara børn skulu læra grønlendskt og íslendskt valla takast bókstaviliga. Heldur snýr hetta seg um, at vit vita alt ov lítið um hvønnannan, hóast vit hava eina langa felags søgu. Henda áheitanin snýr seg sostatt um, at vit skulu læra nakað um onnur í Útnorði. Vit skulu verða nóg betur kunnað um viðurskifti í Íslandi og Grønlandi, eins og uppvaksandi ættarliðini í hesum báðum londum skulu verða betur kunnað um okkum og okkara land. Til hesa kunning hoyrir sjálvsagt ein grundleggjandi vitan um málini. Hinvegin fer eingin í álvara, at krevja at føroysk børn skulu vera fullkøn í inuit máli, tá ið tey fara úr fólkaskúlanum. Men tey skulu vit nógv meira um mál, mentan og lívið í okkara grannalondum. Vit skulu sostatt hava meira mentanarligt samband millum londini í Útnorði. Hetta er fortreyt fyri meira búskaparligum sambandi.

Avvarðandi myndugleikar eiga alt fyri eitt at fara undir at kanna, hvussu áheitanini hjá ÚTNR kann verða gingið í møti. Farið eigur at vera undir at framleiða undirvísingartilfar, og tað eigur at verða skipað fyri vitjan av skúlaflokkum. Internetið er eisini eitt upplagt amboð í hesi tilgongd. Hugskotið um, at tey ungu skulu vita meira um londini í Útnorði er sera gott. Nú er at vóna, at myndugleikarnir liva upp til sína ábyrgd, so vit fáa meira og betri samband í ein útnyrðing.

**Sosialurin**

## Eingin er ódeyðiligur – heldur ikki politikarar

DAGNY JOENSEN



**Hava okkara politikarar akt, sum teir hava makt, hava teir at gera so væl og taka viðurskiftini hjá okkara gomlu í álvara og gera nakað við tað. Alt annað er tómt tos og faktir, sum eingin kann taka fyri fult, heldur ikki fjóðra hvørt ár**

SJÓNARMIÐ:

Umleið 100 gomul fólk við bráðfeingis tørvi at sleppa á røktar- ella ellisheim sita óhjálpin heima við hús í Tórshavnar Kommunu. Hetta er ikki nakað nýtt. Tað vanlukkuliga er, at trupulleikin hevur staðið við og versnað í fleiri ártíggju. Kortini eru ikki útlit fyri, at almenna skipanin letst um vón.

Vanliga siga vit, at ein triðingur av Føroya fólki býr í Havn. Stóra tilflytingin er heldur ikki nýggj, ei heldur, at tey gomlu, tá tey ikki kunnu verða einsamøll longur, noyðast at flyta hagar, børnini ella onnur avvarðandi búgva, tí einki annað er teimum í boði.

Tað er eisini ein vakur tanki, at eitt nú børnini taka sær av sínum gomlu og á henda hátt kunnu løna foreldrunum tað aftur, sum tey hava verið fyri síni børn.

Gerast árini nógv, kann væntast, at neyðugt er við stuðli til familjur, sum hava eldri fólk búgvandi. Í fyrstuni kunnu familjurnar hjálpast við heimahjálp og avbera góðu skipanini við dagstovnum, men sum frálíður er tað ikki nóg mikið. Størri inntriv mugu gerast, um tey gomlu skulu hava góð og virðilig ellisár. Annars verður tað bert til eitt dagligt baks, sum sindrar tilverugrundarlagið hjá teimum gomlu og teimum, sum varða av.

### At liggja øðrum til byrðu

Hava tey gomlu skil fyri síni lagnu, er tað sum steinur oman á byrðu at kenna seg verða til fortreð fyri síni kæru. Kann eingin ímynda sær, hvussu ræðuligt tað er, eftir eitt langt og strævið lív, at vera ein byrða fyri síni?

Hvussu vælviljaðar familjurnar hjá teimum gomlu enn eru, so kunnu tey ikki megna at geva teimum umstøður, sum eftir røttum áttu at verið ein almenn uppgáva. Stríð er frá morgni til myrkurs.

Eru tey gomlu illa fyri, hevur familjan ampa av at fara til arbeiðis og eisini ampa, tá tey koma heimaftur, tí orkan er ikki til at gera stórvegis við málið. Hjá familjunum gerst tilveran enn torførari, tí eingin veruligur glotti er fyri framman.

Hava vit gomul foreldur, eru børnini eisini komin so væl til árs, at tey ikki hava orku at fáa arbeiði og heimalív at ganga upp í eina hægri eind

### - 100 eru í somu støðu sum tit

Eftir hetta kundi ein hugsað sær, at nú noyðist tað almenna at hjálpa til, men gakk. Alt meðan vit byggja tunnlar og kjakast um, hvussu gagnligt tað er fyri vinnuna, hava vit ikki ráð at geva teimum gomlu trygg kor seinastu tíðina, tey eru í hesum heimi.

Sjálvandi skulu vegir og tunlar ikki setast upp móti eldraforsorgini. Heldur hinvegin – hava vit ráð at útbyggja infrastrukturin, hava vit avgjørt eisini ráð at taka okkum av teimum gomlu.

So byrjar biddaragongdin í royndini at fáa almennu myndugleikarnar í talu. Hóast væl vitandi, at tað ikki gevur úrslit, venda fólk ranguna út á sær sjálvum fyri at fáa avvarðandi myndugleikar at skilja, hvussu vánaligar umstøðurnar eru heima. Svarið er: ”- Vit vita væl, hvussu skilið er, men vit kunnu einki gera. 100 familjur eru í somu støðu sum tit!”

Tað er mannminkandi fyri allar partar.

### Takkarlønin

Eftir eitt langt lív er tað takkarlønin, tey gomlu fáa, fyri at hava lagt lunnar undir hetta samfelagið.

Hvørjir eru okkara politikarar, sum ikki hava virðing fyri teimum gomlu? Er framkomna samfelagið, sum somu politikarar so spelknir vilja kalla tað, ikki ført fyri at gera nakað ítøkiligt fyri at bøta um støðuna á eldraøkinum? Tað ber stutt sagt ikki til og er enn minni til at liva við. Tað er ófyrigeviligt, at vit skulu sleppa okkara gomlu upp á fjall við einføldu umberingini, at tað eru fleiri, sum eru verri fyri.

### Tómt tos og faktir

Tørvurin at útbyggja á eldraøkinum fellur ikki burtur, fyri tað um myndugleikarnir blunda og lata standa til. Trupulleikin hvørvur ikki av sær sjálvum, heldur hinvegin. Um nøkur ár eru tað tey ráðandi, sum fara at hava sama tørv, og tá er eingin góða mamma.

Í nútíðar samfelagnum gongur alt við rúkandi ferð. Tað tykist, sum halda vit okkum vera ódeyðilig. Vit skúgva til viks hugsanina um, at lívið broytist við árunum, og at vit kanska ein dag kunnu gerast gomul og óhjálpin.

Hava okkara politikarar akt, sum teir hava makt, hava teir at gera so væl at taka viðurskiftini hjá okkara gomlu í álvara og gera nakað við tað. Alt annað er tómt tos og faktir, sum eingin kann taka fyri fult, og er bert at sammeta við tómt túnatos 4. hvørt ár, tá valstríð er.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.